








# Frálík íbúð í Hoyvík

Vil tú búgva væl og ómakaleyst, so er sera snøgga íbúðin í Hoyvík svarið uppá tínar íbúðarspurningar.

**Tá tú kemur til økið**
Tá ið tú koyrir niðan Løgmannabreyt, snarar tú til høgru inn í Maritugøtu og síðani til vinstru. Økið er alt liðugt gjørt – snøgt og snotiligt. Við síðuna av er parkeringspláss, og dagstovnurin liggur beint við síðuna av. Hinumegin liggur spælipláss og FIFA-vøllur, so tú kanst hyggja eftir børnunum. Gøtur eru millum býlingarnir, so tær ikki nýtist at ganga millum bilarnar. Nær við liggur Karlamagnusarbreyt við komandi møguleikum og tænastum.

**Umhvørvið**
Íbúðin liggur í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við góðum sólargangi og góðum grannalagi, og har er sera barnavinaligt við spæliplássi og FIFA-vølli beint uttan fyri stovuvindeyga. Dagsstovnur og býlingshús er beint við, og bilfrí gøta er millum býlingarnar og oman til skúla. kirkju, handil m.v

**Fyrsta fatanin**
Tá ið tú kemur upp trappurnar er snøgt útigólv, har tú, tá ið góðveður er, kanst njóta ein kaffimunn ella ein døgurðabita. Beint við snøgt amboðsrúm við gólvhita, ið tú kanst brúka í hesum sambandi. Grannarnir eru friðarlig og fyrikomandi fólk.

**Inni og úti – ljós og luft**
Komin inn varnast tú straks, at her er talan um dygd og trivnað. Góðskan er góður karmur um heimliga dámin longu, tá ið tú kemur inn í gongina. Vindeyguni eru stór, so tú fært nógv ljós inn. Í stovuni er frálíkt útsýni beint út í náttúruna og umhvørvið, og tú sært heilt út á fjørðin og yvir á Nólsoy. Út frá stovuni kanst tú fara út á svalan at fáa tær luft og ein kaffimunn aftur við morgunsólini.

**Stílur, snið og tøkni**
Rúmini eru snøgg og ljós, og alt er gjørt úr besta tilfari. Tað er ein fragd at seta innbúgvið inn í slíkar karmar, og tær nýtist einki stórvegis at gera. Alt er sum tað eigur at vera. Gott pláss er á loftinum við tøttum tróðri at goyma ymiskt. Íbúðin er væl gjørd í góðum byggjaríið við góðum tilfari. Betonveggir eru millum íbúðirnar og betondekk dekk millum hæddirnar, so ikki hoyrist millum.

**Fakta**
Íbúðin er í 1 hædd á 76 fermetrar og harafturat er stórt ovastaloft. Byggiár: 2006. Har er útigólv/terassa, goymslurúm, inngongd, gongd, baðirúm/vaskirúm, hjúnarrúm, kamar, køkur/alrúm/borðsstova/stova við útgongd til útigólv/altan. Gólvhiti er í gongd, baðirúmi og goymslurúmi. Prísuppskot: kr. 1.700.000,00.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni